gult10 cyan10 magenta10 svart10

FISKIVINNUTÍÐINDI

Gólvuppboðssølan

Gólvsølan

101 bátar seldu knøpp 44 tons um gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum mikudagin.

Syslu-nummar	Skipanavn	reiðskapur	kilo
FD 79	Havørnin	snella	162
FD 123	Riddarin	snella	195
FD 176	Helen	lína	372
FD 237	Eyð	snella	89
FD 250	Halgerð	lína	57
FD 256	Aðnasker	snella	62
FD 258	Tinna	snella	67
FD 287	Havfrúgvin	lína	290
FD 322	Klettur	snella	63
FD 329	Karin 3	lína	219
FD 361	Súlan	lína	356
FD 367	Báran	snella	298
FD 428	Margit j	lína	198
FD 553	Brandur	lína	1.476
FD 571	Durita	lína	739
FD 591	Maria	lína	99
FD 608	Lambanes	lína	223
FD 753	Maria	snella	320
FD 775	Langanes	snella	124
FD 780	Bakkafossur	snella	124
FD 783	Glúpur	lína	1.021
FD 84	Jón	snella	34
FD 855	Lómur m/b	snella	220
FD 863	Heidi	snella	177
FD 905	Trúgvi	lína	284
FD 981	Másin	snella	145
FD1054	Aldubáran	snella	59
KG 125	Bjarnaberg	lína	300
KG 127	Skurðaklettur	lína	1.233
KG 170	Eljan	snella	23
KG 288	Heltnin	lína	850
KG 303	Gerd	lína	265
KG 321	Kópasteinur	lína	87
KG 353	Miðhamar m/b	snella	39
KG 391	Eysturhøvdi	lína	653
KG 423	Jaspissteinur	snella	222
KG 430	Báran	lína	1.744
KG 47	Havsbrún	lína	1.351
KG 507	Søkin	lína	3.229
KG 512	Neshamar	snella	116
KG 543	Halgafelli	lína	884
KG 561	Fagriklettur	lína	1.139
KG 587	Reynsmúli	lína	2.781
KG 608	Herdis	lína	562
KG 642	Bragd	lína	2.068
KG 665	Eysturroðin	snella	202
KG 703	Henny	lína	654
KG 705	Sonja	snella	213
KG 742	Guðrun	lína	129
KG 743	Elsa	lína	460
KG 744	Osla	lína	1.270
KG 79	Nevið reyða	lína	998
KG 900	Garðapetur	lína	30
KG 94	Brid ford	lína	882
TG 159	Vesturbúgvin	snella	220
TG 178	Maj	snella	65
TG 26	Majbritt	snella	33
TG 349	Trý drangur	snella	170
TG 397	Kvikk	snella	249
TG 40	Kambur	snella	431
TG 401	Barbara	snella	199
TG 420	Báradrangur II	lína	2.559
TG 471	Núpur	kalvalína	313
TG 487	Topas	snella	150
TG 514	Keldafossur	snella	476
TG 523	Sóley	snella	214
TG 55	Bláaberg	snella	207
TG 576	Svanur	snella	195
TG 592	Jenny B	snella	129
TG 620	Bergur ii	snella	240
TG 622	Varðin	snella	238
TG 628	Alis T	lína	938
TG 797	Norðfarið	snella	186
TG 91	Stjørnan	snella	37
TN 357	Jensia	snella	459
TN 390	Trý systkin	lína	199
TN 485	Snævalheyggur	lína	275
TN 712	Teistaklettur	lína	453
TN 753	Tóra	lína	701
TN 805	Anna	snella	92
TN 892	Nøvan	snella	314
TN 897	Maj-n	snella	420
TN 91	Lómur	snella	236
VA 105	Barið	snella	137
VA 109	Ella	snella	145
VA 135	Havfrúgvin	snella	133
VA 164	Niklái	snella	75
VA 190	Sjóberið	snella	234
VA 251	Elvira m/b	snella	153
VA 28	Álitið	snella	95
VA 294	Nestangi	snella	90
VA 300	Cemary m/b	snella	171
VA 324	Skarvur	snella	80
VA 60	Dáva Dánjal	snella	347
VA 66	Gunnvá	snella	469
VA 82	Raðnes	snella	637
VN 204	Svanurin	snella	127
VN 286	Skálabáturin	snella	39
VN 309	Atlanta	snella	251
VN 425	Halla	snella	109
VN 480	Sæli	snella	92

Vørunavn	kilo		
Brosma 0	50	Longa 1	114
Brosma 1	40	Longa 2	230
Brosma 2	214	Longa 3	64
Brosma 3&4	472	Longa 4&5	73
Hýsa 1	2.216	Reyðsprøka 0	4
Hýsa 2	4.097	Skøta	46
Hýsa 3	3.813	Skrubba	57
Hýsa 4	1.768	Steinbítur	27
Havtaska 0	279	Toskur 1	165
Hávur	80	Toskur 2	2.082
Hvítingur 0	4.318	Toskur 3	9.361
Kalvi 1	474	Toskur 4	8.618
Kalvi 2	139	Toskur 5	4.211
Kalvi 3	4	Tunga 0	25
Kalvi 4	14	Upsi 0	268
Kalvi 5	1	Upsi 2	37
Kongafiskur 0	2	Upsi 3	59
Kongafiskur 2	21	Upsi 4	132
Kongafiskur 4	47		
Longa 0	17		

Sundaberg tikin á stongdari leið

Sundaberg fekk 133.000 krónur í bót frá russum fyri at hava roynt á eini stongdari leið.

Flakatrolarin Sundaberg úr Klaksvík varð 23. mai tikin av russisku vaktartænastuni í Barentshavinum, tí hann royndi á eini stongdari leið. Leiðin hevur verið stongd síðan 28. mars og letir upp aftur í dag.

Av Kjølbro verður sagt, at boðini um at leiðin var stongd vóru komin til reiðaríið, men av eini ella aðrari orsøk, vóru tey ikki nóg greidliga fráboðaði umborð. Sundaberg royndi saman við russiskum skipum og tey fluttu saman inn í hetta økði. Reiðaríið veit ikki, um økið var stongt fyri allari veiðu, ella um tað bara var stongt fyri flakatrolarunum.

Skipari og reiðarí fingu 19.000 US dollar ella 133.000 krónur í bót og tóku við bótini. Sundaberg varð ikki tikin til lands, men kundi byrja fiskiskap aftur beinanvegin, uttanfyri stongdu leiðina, sjálvsagt.

Manngin á Sundaberg sá nakað framman undan eitt flogfar hjá russisku vaktartænastuni yvir trolaranum, men gáaðu ikki meira um tað. So kom vaktarskipið og dagbøkurnar sýndu, at Sundaberg hevði roynt á stongdu leiðini.

Íslendska vevsíðan Interseafood veit at siga, at ólógliga veiðan fevnir um 9 tons av toski, 160 kilo av hýsu og 50 kilo av svartkalva.

Skipari á Sundaberg er Brandur Joensen úr Miðvági.

Sundaberg hevur annars havt góðan fiskiskap. Skipið fór avstað fyri einum mánað síðan og hevur 230 tons inni. Í fyrradagin fingu teir 17 tons í flaki. Sundaberg er tann føroyski flakatrolarin, sum er nógv best fyri í løtuni. Hann fiskar eisini kvotuna hjá Skálaberg, sum er leigaður til Grønlands.

gult11 cyan11 magenta11 svart11

Góð útlit fyri fiskamjøli og lýsi

Orsakað av vánaligur fiskiskapi í Kili er prísurin á mjøli og lýsi farin 24 prosent upp. Fiskiskapurin eftir íðnaðarfiski í Kili er í ár 35 prosent lægri enn í fjør og hendan lækkingin hevur trýst prísin á fiskamjøli og lýsi upp. Tað skuldi so merkt, at føroyskir nótabátar fara at fáa enn betri prís á Havsbrún.

Framleiðslan av fiskamjøli er higartil í ár fallin við 600.000 tonsum Tað er serliga fiskiskapurin í Kili, sum hevur svikið. Heimsins størsta fiskiveiðutjóð, Peru hevur higartil í ar mótikið fýra milliónir tons. Í apríl vóru landaði 1,4 milliónir tons fiskur í Peru.

Norskir línubátar flagga út til Íslands

Norskur línubátur á Havnini herfyri

Íslendskir reiðarar óttast nú, at fleiri norskir línubátar verða skrásettir í Íslandi. Íslendarar halda, at tvær orsøkir kunnu vera til hetta. Tann eina er, at longa og brosma ikki eru undir kvotuskipan í Íslandi og so lúra norðmenn eisini eftir íslendskari toskakvotu í Barentshavinum, skrivar íslendski vevstaðurin Interseafood..

Íslendska blaðið Fiskifrettir visti í seinastu viku at siga, at norski línubátur-in »Sildøy« nú skal undir íslendskt flagg og hava heimstað á Seyðisfirðinum.

Stjórin í Visir í Grindavík, Petur H. Pallsson sigur at ongin ivi er um, at norskir reiðarar meta um møguleikan at flagga út, og at fleiri eru á veg til Íslands.

– Vit hava ikki veitt nógva longu og brosmu í íslendskum sjógvi, og tað tykist sum norsku bátarnir fara at nýta hesar stovnar sum springbretti til toskakvotuna í Barentshavinum, sigur Pálsson við Interseafood.

Bátarnir sleppa til íslands við at nýta íslendskar strámenn.

Mynd:; Álvur Haraldsen

Farmaskip bíðaði eftir russa

Seinastu vikuna hevur eitt gult farmaskip ligið á redini í Nólsoyarfirði og bíðað eftir farmi. Talan er um eitt skip, sum er skásett undir hentleikaflaggi og tað hevur verið í Føroyum. fyrr. Í gjár kom so russiski trolarin, sum biðað var eftir og umskipingin byrjaði beinanvegin.

Farmurin var svartkjaftur. Nú eru ongi russisk svartkjaftaskip í føroyskum sjógvi. Her er og lítið at fáa akkurát nú. Russisku skipini eru flutt í altjóða sjógv og okkurt roynir eftir svartkjafti í norskum sjógvi.

je

Nýggir saltfiskamarknaðir

Tað er torført at selja upsa og stórseið, men búskaparlig framgong í Miðamerika hevur latið upp nýggjar marknaðir fyri norskan saltaðan upsa, skrivar Intrafish.

– Tað gongur væl at selja saltaðan upsa í Dominikanska Lýðveldinum og nú fara vit undir at finna nýggjar marknaðir í Miðameriku, sigur Bardon Stene, stjóri í norska Eksportudvalget,

Saltfiskamarknaðurin hevur verið munandi betri enn í fjør, sum var eitt sera vánaligt ár. Prísurin á saltaðum toski er hækkaður 10 prosent í mun til í fjør og og saltað longa hevur fingið sera góðan prís. Her er talan um ein vøkstur upp á 85 prosent.